gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Blóðdálkaður forsætisráðharri

## *Oddagrein*

Um dagarnar frættist, at fyrrverandi enski forsætisráðharrin, Margareth Tatcher, nú verður drigin fyri altjóða mannarættindadómstólin, tí hon skal hava framt krígsbrotsverk undir Falklandskrígnum, sum var í 1982, tá Argentina hertók bretska hjálandið við suðurenda Suðuramerika.

Sum so er tað ikki nakað at fegnast um, at fólk verða drigin fyri rættin. Men tað er at fegnast um, at okkurt nú er, sum bendir á, at heimssamfelagið ikki góðtekur, at stjórnarleiðarar gartera sum teimum lystir.

Annað dømi høvdu vit, tá enska stjórnin helt fyrrverandi Kilska einaræðisharranum, Pinochet, aftur í nógvar mánaðir, tí hann møguliga eisini skuldi dragast fyri rættin. Men tíverri tordi bretska stjórnin ikki at standa móti trýstinum - m. a. frá somu Margareth Tacther, og teir lótu Pinochet sleppa heim - tí stjórnarleiðara í okkara tíð, ið hevur eina mest mannalív á samvitskuni. Tað er stórt spell, at tað skal bera til.

Men politikkur er politikkur. Enska stjórnin - hóast sosialistiska skjaldaramerkið - torir ikki at standa ímóti kapitalinum. Fáfongd eru tey, ið trúgva, at Tony Blair fer at lata ein fyrrverandi bretskan stjórnarleiðara - hóasta mótstøðufólk - útflýggja til rættarsókn.

Og vit kunnu halda fram, so sum vit so mangan hava gjørt á hesum stað og vísa á onnur stríð - t. d. stríðið á Balkan, har lond í Vesturheiminum hava gjørt sær dælt við vápnasølu o. ø, sum hevur havt størri týdning, enn at steðga tápuliga og meiningsleysa borgarakrígnum. Eingin skal billa okkum inn, at NATO saman við USA ikki fær steðga einum slíkum kríggi, um vilji er til tess.

Og so eru tað vit í Norðurlondum, sum altíð eru so fitt og pen. Vit halda okkum uttan fyri øll heimsins stríð - samstundis sum Svøríki og Noreg og onnur við eru stórir vápnaútflytarar. Onkustaðni lekur millum teori og praksis.

Men vit kunnu so staðfesta, at tann stjórnarleiðarin á okkara leiðum, sum hevur flestar mannalagnur á samvitskuni, eitur Margareth Tacther.

Spurningurin er so bara, um mannarættindadómstólurin og bretska stjórnin, halda tað vera í lagi…

***Sosialurin***

# Fingið bretsk legat

*24 ára gamli Heðin Poulsen hevur fingið játta sonevnt scholarship frá bretsku stjórnini*

Jákup Mørk

Síðani hann í fjør varð liðugur at lesa løgfrøði í Aberdeen, hevur ungi havnarmaðurin, Heðin Poulsen, starvast í Føroyum. Nú gongur leiðin so aftur til bretska meginlandið, hesaferð til Southampton, har hann skal lesa altjóða rætt komandi árið.

**Bretar gjalda**

Talan er tó ikki um eina heilt vanliga skúlagongd. Á hvørjum ári letur bretska stjórnin í samstarvi við fleiri altjóða viðurkend virki 2.400 sonevnd scholarship, ella legat, til lesandi kring allan heimin, og komandi skúlaárið telist Heðin millum hesi.

Á heimasíðuni hjá bretsku ambassaduni í Danmark stendur at lesa, at legatið verður latið ungum lesandi, sum kunnu roknast at teljast millum teirra, sum verða við til at skapa framtíðar samfelagið.

Ongar treytir um framtíðar bindingar eru viðlagdar legatinum, men afturfyri peningin, sum verður latin teimum lesandi, verður roknað við, at hesi í framtíðini hava eina »vinarliga« áskðan mótvegis bretsku stjórnini.

Sum nevnt, er Heðin Poulsen 24 ára gamal. Hann hevur lokið prógv sum løgfrøðingur á University of Aberdeen, og hevur seinasta árið starvast í Føroyum, har hann millum annað hevur verið skrivari í nevndini, sum fyrireikar føroyska yvirtøku av skipaeftirlitinum.



*Heðin Poulsen úr Havn, sum hevur lisið løgrføði í Aberdeen, hevur nú fingið scolarship frá bretsku stjórnini*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Lestrararmøguleikar við ella uttan fullveldi

Meginfelag Føroyskra Studenta (MFS) skipar fyri lestrarstevnu leygardagin 22. juli kl. 16.

Lestrarstevnan verður hildin í Norðurlandahúsinum undir heitinum: »Føroysk lesandi og framtíðin – innan hvørjar karmar?«

Í sambandi við fullveldisætlanina hjá landsstýrinum hevur nógv verið frammi í fjølmiðlunum um framtíðarstøðuna hjá føroyskum lesandi, um so er, at Føroyar gerast sjálvstøðugar og sostatt ikki longur gerast partur av donsku útbúgvingar- og stuðulsskipanini.

Politikarar o. o. eru sera ymisk á máli um, hvussu framtíðin sær út fyri føroysk lesandi, og hava tað fer eftir fer verið mótsigandi sjónarmið frammi hesum viðvíkjandi. Hetta hevur viðført, at føroysk lesandi í dag kenna seg ótrygg og alt ov lítið kunnað um, hvørjir karmarnir verða fyri lesandi í framtíðini.

Meginfelag Føroyskra Studenta hevur tískil valt at skipa fyri lestarstevnu í ár, ið hevur til endamáls at upplýsa um framtíðarútlitini hjá føroyskum lesandi í og uttan fyri Føroyar – við og uttan fullveldi, og siga tey, at øll eru vælkomin.

Stevnan verður sett leygardagin klokkan 16.00

Klokkan 16.15 fer Terji á Lakjuni, stjóri á Stuðulsstovninum, at greiða frá føroysku stuðulsskipanini og stuðulskipaninum í hinum norðurlondunum. Hann greiðir eitt nú frá, hvørji støðu føroysk lesandi eru í nú samanborið við lesandi í hinum norðurlondunum.

Tá tosað verður um møguligt føroyskt fullveldi hevur m. a. verið nevnt, at Føroyar fara at nýta stuðulsskipanirnar í grannalondunum sum fyrimynd fyri eini nýggjari føroyskari stuðulskipan. Hvat hevur hetta at týða fyri føroysk lesandi?

Klokkan 16.45 fara Hjálmar Hátún, Heini Hátún og Bjørn Kunoy at greiða frá, hvussu tað er at verða føroyskur lesandi uttan fyri ríkisfelagsskapin.

Teir tríggir hava lisið í Noreg, USA, Bretlandi og Fraklandi. Teir fara m.a. at greiða frá lestrarstuðulsskipaninum í ymisku londunum og eisini verður greitt frá týdninginum av tí donsku og føroysku stuðulsskipaninum fyri lesandi, ið lesa uttan fyri ríkisfelagsskapin, og um møguleikarnar at fáa legat, bústað og lestrarpláss á ymiskum skúlum.

Sum er fara flest øll føroysk lesandi, ið fara uttanlands í lestrarørindum, til Danmarkar, og er hetta heilt klárt ikki til fyrmuns fyri føroyska samfelagið, sigur MFS, sum við hesi frágreiðing vónar at elva til, at fleiri føroysk lesandi fara í onnur lond at lesa til tess, at føroysk vitan skal gerast meira fjølbroytt og ávirkað úr alskyns londum til gagns fyri føroysk lesandi og tað føroyska samfelagið sum heild.

Klokkan hálvgum seks fer Malan Marnersdóttir, rektari á Fróðskaparsetrinum,at siga sína hugsan um, hvussu Føroyar eiga at menna Fróðskaparsetrið, lestrarúrvalið, tað føroyskra lestrarumhvørvið og karmarnar hjá teimum lesandi í Føroyum sum heild.

Klokkan 18.00 verður pallborðsfundur við Høgna Hoydal, landsstýrismanni og Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinnu og framsøgukvinnu hjá Javnaðarflokkinum í undirvísingar- og mentamálum.

Høgni Hoydal og Katrin Dahl Jakobsen fara at greiða frá ætlanum og útlitum hjá føroyskum lesandi í framtíðini – bæði við og uttan fullveldi.

Teimum báðum verða settir ymiskir spurningar, ið hava til endamáls at fáa greiðu á, hvørjir karmarnir hjá føroyskum lesandi verða í framtíðini. Eisini verður høvi hjá øðrum at seta teimum spurningar.

# Nógvur lundi at fáa

John Johannessen

Á Viðareiði hevur nógvur lundi verið at sæð seinastu dagarnar. Menn hava fleygað bæði í urini og í seyðtorvu, og væl hevur hilnast. Týsadgin fingu teir 1.700 lundar í Seyðtorvu.

Veðrið hevur ikki verið tað besta at fleya í sessunum á Viðareiði seinastu tíðina. Bestu ættirnar at fleyga eru nevniliga sunnan og landssynningur, meðan hann seinastu tíðina mest hevur verið høgur í ættini.

Tá Sosialurin mikumorgunin tosaði til Viðareiðis var tað tó av bestu líkindum at fleyga.

# Fyrilestur um halgisiðir

John Johannessen

Sunnudagin heldur Hanus A. Samulesen fyrilestur halgisiðir í Føroyum í bygdarhúsinum á Húsum á Kalsoynni.

Fyrilesturin verður hildin í sambandi við túsund ára haldið fyri kristniboðan Føroya.

Afturat fyrilestrinum fáa áhoyrararnir eisini høvi at hoyra Niels Midjord, Petur J. Eliasen og Hans J. Hansen syngja sjósálmar, soleiðis sum Marius Vilhelmsen á Syðradali sang teir.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara kæri bróðir

**TOBIAS ANDREAS ASKILDSEN**

andaðist á Landssjúkrahúsinum 18. juli 71 ára gamal.

Farið verður úr kapellinum hósdagin kl. 17.30. Jarðarferðin verður úr Ebenezer fríggjadagin kl. 14.

*Fyri tey avvarðandi*

**Theodine, Sunneva og Olav**

gult cyan magenta svart



# Stórfilmurin um Watson vísast í 1200 filmshallum

*Allir føroyingar eru óløntir sjónleikarar í actionfilminum, sum skal frumvísast komandi heyst. Watson kemur til Føroya í næstum at taka seinastu myndirnar til stórfilmin „Ocean Warrior“*



Dia Midjord

Sjónleikarar, filmsleikstjóri og onnur, ið hava við filmin at gera, vóru umborð, tá Paul Watson herfyri vitjaði í føroyskum sjógvi og gjørdi ein part av upptøkunum. Talan er um tað størstu hollendsk/amerikansku filmsframleiðsluna nakrantíð. Kostnaðurin er 350 milliónir krónur.

Hetta stendur at lesa á hollendsku heimasíðuni hjá World Online, ið er ein tíðindatænasta á netinum. World Online hevði ein journalist við umborð á Ocean Warrior.

**Nógv kend fólk**

Millum annað stendur at lesa um filmin Ocean Warrior, at hesin skal fortelja um lívssøguna hjá Paul Watson og drúgva bardaga hansara fyri hvali og kópi.

Kanska eitt sindur keðiligt fyi Watson og sjálvan filmin, at Ocean Warrior sigldi runt í Orknoyggjum, tá brádliga tvær grindir vitjaðu í Føroyum. Men filmsliðið skal sjálvandi eisini hava myndir av kópahirðanum „in action“

Filmsleikstjóri í filminum Ocean Warrior er amerikumaðurin John Badham, ið hevur leikstjórnað filmum sum eitt nú Saturday Night Fever, Blue Thunder, War Games, Stakeout, Whose Life is it Anyway? og Jack Bull.

Høvuðsleiklutin hevur eisini ein amerikanari. Hann eitur James Marsden og hevur spælt við í filmunum X-Men, Gossip og Disturbing Bahavior.

**Bøturnar ein brøkpartur**

Samlaði kostnaðurin av filminum Ocean Warrior verður í minsta lagi 350 milliónir krónur. Frumsýningin verður í oktober komandi ár, og longu nú hava 1200 filmshallir í USA og Kanada umbiðið filmin.

Út frá hesum tølunum, eru bøturnar frá Mogens Nepper-Christensen á 50.000 og 100.000 krónur barnamatur. Hetta rindar Paul Watson fegin fyri, at filmsliðið kann fáa sínar myndir í kassan. Jú meiri dramatikkur, jú betri gerst filmurin. Og Paul Watson kann skúma fløtan, meðan limalistin í Sea Shepherd felagsskapinum veksur við sjeymíla ferð.

**Kim van Kooten umborð**

Kenda hollendska sjónleikarkvinnan Kim van Kooten var eisini við á hesi føroyaferðini hjá Paul Watson. Kim van Kooten er forlovað við Hans Teeuwen, ið var ein av monnunum í gummibátinum, sum Ocean Warrior slepti á sjógv í Nólsoyarfirði.

Kim van Kooten skal spæla leiklutin hjá eini ungari gentu, sum biður Paul Watson lova sær við ein túr. Hon gjørdi research á ferðini, men er farin í land aftur. Victor Löw, ið somuleiðis var umborð, skal eisini spæla við í filminum.

Sambært hollendskum fjølmiðlum, so skal kendi hollendingurin Rutger Haoer umborð á Ocean Warrior hesaferð. Rutger Haoer hevur spælt við í fleiri James Bond-filmum og hevur oftast leiklutin, sum tann illi maðurin. Umframt Haoer skulu tveir aðrir kendir sjónleikarar í Hollandi, Fedja van Huet og Thom Hoffman við á komandi føroyaferð hjá Ocean Warrior.

**Tíðin gongur undan**

Tá Paul Watson kemur aftur, verður tað fyrst og fremst fyri at fáa seinastu myndirnar í kassan. Men tíðin er knøpp, tí upptøkurnar eru bert ein partur av samlaðu filmsframleiðsluni. Paul Watson má gera skjótt av og verður uttan iva noyddur at gera ein vørr, tá hann aftur er í føroyskum sjógvi.

Fær hann lokkað eitt av gráu vaktarskipunum upp í leikin ella tað bara vísir seg nær Ocean Warrior, ja, so er ikki neyðugt við fleiri upptøkum. Mest sannlíkt takkar Paul Watson fyri seg á hesum sinni, og grindahvalurin má svimja sín egna sjógv.

# Væl eydnað rán?

Eingin er skuldsettur og eingin er í kikaranum hjá politinum. Hetta er status fyri vápnaða ránið, ið bleiv framt av einum persóni í handlinum hjá P. A. Restorff um lukkitíð 13. april í ár. Kanningardeildin hjá politinum í Havn arbeiðir framvegis við málinum.

# Langur gestur



Útvið tredivu ferðamannaskip koma á vitjan í summar. Í løtuni liggja tvey til bryggju í Havn. 204 metra langa Seabourn Sun er ávegis til Íslands og Grønlands úr Hetlandi, meðan 120 metra langa Vistamar er á veg til Bretlands úr Íslandi. Seabourn Sun er næststørsta ferðamannaskip, ið verið hevur til bryggju í Havn. Í fyrrári vitjaði ein flótandi stálgestur, ið var 280 metrar langur.